# Stjørnan basti meistarunum

**Saman við Neistanum hava klaksvíkskvinnurnar fyribils lagt seg á odda í kvinnukappingini í hondbólti**

SUNSET-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Fimm dystir vórðu spældir í kvinnukappingini um vikuskiftið. Upprunaliga var talið sjey, men heldur ikki hetta vikuskiftið fekk Tjaldur avgreitt sínar dystir, og fyribils stendur eitt stórt spurnartekin fyri, hvussu verður við dystunum hjá runavíkskvinnunum í vetur. Soleiðis sum kappingin er skipað, ber í øllum førum illa til at kroysta skipanina enn meira saman, og tí má ein greiða útmelding skjótt koma, hvørt dystirnir skulu spælast ella ikki.

Av hinum fimm dystunum vórðu í seinasta lagi framdar nakrar broytingar í skipanini, og tí varð skráin als ikki soleiðis, sum vit høvdu lagt upp til í vikuskiftisútgávu okkara.

Skráin var tó óbroytt á tann hátt, at mest spennandi uppgerðin framvegis gekk fyri seg í Vági, men ú var tað Stjørnan og ikki Neistin, sum var á vitjan.

Og her eydnaðist Stjørnuni at vinna ein sannan arbeiðssigur, eftir VB annars hevði verið á odda í steðginum. Sum dysturin leið, so fekk Stjørnan tó eitt alt betri tak á dystinum sum heild og serstakliga Daivu Toumaite. Og tað gav eisini úrslit at enda.

Saman við Stjørnuni hevur Neistin nú lagt seg á odda. Bláu havnarkvinnurnar høvdu hesa ferð vitjan av Søljuni, og tann dysturin gjørdist ongantíð spennandi. Fyri steðgin gjørdi Neistin kanska ikki so nógv burturúr, men 21-2 í seinna hálvleiki varð alt so ruddiliga sett upp á pláss.

Leygardagin var høllin á Hálsi karmur um uppgerðina millum Kyndil og VÍF, og tann dysturin var nakað nógv meira spennandi. Her hevði VÍF leingi eitt sera gott tak á, men liðið tóktist skelkað, tá Nikolina Eyðbjørnsdóttir varð flutt á sjúkrahúsið við nøkrum, sum líktist einum álvarsligum knæskaða. Samstundis fekk Kyndil alt betri fatur á Ioanu Rápa, og so kundu tær grønu fegnast um, at málið um eitt pláss í ovara endaspælinum ikki tykist heilt veruleikafjart.

VÍF reistist tó aftur sunnudagin, tá tær vitjaðu á Skála. Her vunnu tær gulu ein tryggan sigur, soleiðis at tær framvegis eru væl við í dystinum um fjórða plássið.

Og loksins kann eisini staðfestast, at eisini StÍF slapp á talvuna. tí syrgdu tær fyri leygardagin, tá tær vitjaðu á Giljanesi, og eisini har gjørdist talan um tryggan útisigur.

**Úrslitini:**

| | |
|---|---|
| Kyndil-VÍF | 24-21 (11-14) |
| Søljan-StÍF | 21-26 (8-10) |
| VB-Stjørnan | 19-22 (10-8) |
| Neistin-Søljan | 33-14 (12-9) |
| StÍF-VÍF | 19-28 (10-14) |



*Hóast VB leingi var við yvirlutan, so eydnaðist tað Stjørnuni at taka stigini við sær, tá tær vitjaðu í Vági sunnudagin*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

# Kyndil vann klassikaran

**Við sigri á VÍF undirstrikaði Kyndil, at teir aftur vilja vera partur av oddastríðnum, men eisini H71 vil tosa við um hetta**

ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*



*Leingi royndu vestmenningarnir at hanga í, men tað eydnaðist ikki heilt at svara aftur, tá Kyndil tíðliga í seinna hálvleiki rann undan við fimm málum á rað*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hóast tað enn er sera stutt fráliðið í hondbóltslandskappingini, so var talan longu um stórdyst í næsta umfarinum, tá VÍF vitjaði í Havn. Gaman í er talan enn bara um grundspæl, og gaman í verður talan í ár um eina finalu, eftir at øll hava hitt øll fýra ferðir. Men dystirnir millum Kyndil og VÍF eru kortini altíð nakað serligt, og í so máta var leygardagurin einki undantak.

Og fyri tað nógva var talan um ein framúr spennandi dyst leygardagin. Fyrra hálva tíman var at kalla eingin munur millum loiðini, tó at Kyndil alla tíðina hevði skutin frammanfyri. Teir grønu høvdu meira ferð á sínum spæli, og onkursvegna tóktust vestmenningarnir at halta nakað aftanfyri, men teir hingu kortini í.

Tað gjørdu teir eisini fyrstu lítlu løtuna eftir steðgin, men so tók at skrædna. frá 17-16 broyttist søtaðn til 24-17, og so skuldi tað gerast sera strævið hjá gestunum. Við fimm málum á rað megnaðu teir tó aftur at kveikja eina vón, men tá Kyndil so enn einaferð svaraði aftur, bar ikki longur til. Teir grønu koyrdu seinastu minuttirnar av dystinum heim, og so var fagnaðurin um sigurin á arvafíggindunum helst størri, enn hann var um tey bæði stigini, sum spurdust burturúr.

Sigurin førdi Kyndil upp á oddasessin í deildini, men her eru teir ikki einsamallir.

H71, sum eisini hevur fleiri fyrrverandi Kyndilsspælarar bæði á og uttan fyri vøllin, tykist nevnliga vera sera væl fyri í ár. Leygardagin tóku teir ímóti StÍF, sum enn er nakað skert av kappingini frá fótbóltinum, eins og saknurin í skurðviðgjørda Sveini Justinussen er sera stórur nú fyrstu umførini.

Hoyvíkingarnir settu mest sum beinan vegin alt upp á pláss. Ikki minst gjørdu teir báðir, Sigtór Andreasen og Bjarni Sørensen, nógv um seg í dystinum, sum endaði heili 35-19.

Seinasti dysturin var í Hoyvíkarhøllini fríggjakvøldið, tá kollfirðingar sýndu, at teir heldur ikki í ár skulu undirmetast. Í fyrsta dystinum á árinum var um reppi, at teir tóku VÍF á bóli, og hesa ferð var tað so Neistin, sum ikki megnaði at standa kollfirðingunum kurl. KÍF var allan dystin fleiri mál frammanfyri, men móti dystarenda var tó um reppið, at teir bláu kortini fingu nakað burturúr. Nærri enn tí eina málinum komu teir bláu tó ikki, og so kundu kollfirðingarnir fegnast saman við Damir Oros, sum nú aftur í leiklutinum sum KÍF-toppskjútti eftir eitt mest sum miseydnað ár í Neistanum.

**Úrslit**

| | |
|---|---|
| KÍF-Neistin | 29-28 (16-11) |
| Kyndil-VÍF | 28-23 (15-14) |
| H71-StÍF | 35-19 (16-8) |

# Tveir landsliðsspælarar í eldinum

**Rógvi Jacobsen var við til at tryggja SønderjyskE javnleik, meðan Johan B. Hansen og Horsens løgdu rygg til avhølving**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað kemur sjáldan fyri, at úrslitini laga seg soleiðis, sum tey gjørdu í donsku superliguni hesa ferð. Fimm av teimum seks dystunum endaðu við javnleiki. Einasti vinnarin varð funnin í Brøndby, har heimaliðið vann á Horsens og harvið legði seg á næstfremsta plássið. Nú er munurin fram til FCK fýra stig.

Føroyski landsliðsspælarin var inntil tað restaði eitt korter á miðvøllinum í vinstru hjá Horsens. Hóast tólv av Brøndby spælarunum ikki vóru tøkir orsaka av skaðum, so var heimaliðið greitt omaná. Úrslitið var 4-1, men Brøndby hevði møguleikar at skjóta í minsta lagið fýra mál afturat. Hóast teir taptu í Brøndby, so eru teir í Horsens framvegis á áttanda plássinum.

Rógvi Jacobsen var á vøllinum seinastu lítlu løtuna, tá ið SønderjyskE megnaði 1-1 á útivølli í Viborg. Talan var um ógvuliga gott úrslit fyri SønderjyskE, sum er botnlið móti Viborg, sum nú er á triðja plássi.

Viborg legði seg á odda í 87. minutti. Minuttin seinni varð Rógvi Jacobsen settur inn í álopið hjá SønderjyskE, og uppaftur ein minutt seinni eydnaðist tað teimum at javna til 1-1, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið.

FCK er framvegis oddalið, hóast teir hesa ferð ikki megnaðu meiri enn 1-1 í Parkini móti OB. Hetta var triði útidysturin hjá OB í hesum kappingarárinum, og teir hava framvegis ikki tapt á útivølli.

Súni Olsen er framvegis skaddur, og hann var tískil ikki á AaB liðnum, sum á heimavølli spældi 2-2 móti FCM. Hetta var eisini úrslitið í jyska klassikaranum og hesa ferð botnuppgerðini millum AGF og Esbjerg, sum framvegis er niðanfyri strikuna.

Leygardagin hevði FCN vitjan í Farum av Silkeborg. Heimaliðið legði seg á odda 2-0, og alt bendi á, at teir vóru á veg móti størsigri. Men so vendi, og tað endaði við, at Silkeborg fekk javna til 2-2, og teir høvdu síðstu løtuna møguleika at skora sigursmálið, uttan at tað eydnaðist.